Starv

# Handverkarar til verkstaðið




Til verkstaðið hjá Farmaleiðum, eru áhugaverd og mennandi størv sum mekanikarar leys at seta sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá verkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá verkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna viðlíkahaldið av lastbilum, trukkum, lastum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni. Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Størvini fevna um**
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, trukkar, lastir o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**

- Mekaniska útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaðir skulu senda umsóknina til:

***Strandfaraskip Landsins***
*Att. Starvsfólkadeildin*
*Boks 88*
*FO-110 Tórshavn*

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 20. januar 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Boga í Gil, verkførara, tel 343060 ella 213046. Teldupost: *big@ssl.fo*

Høvuðsuppgávan hjá fyri-tøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 30 · www.ssl.fo

REPROZ

# Byggifrøðingur

Søkt verður eftir byggifrøðingi/-teknikkara at byrja beinanvegin, skal kunna tekna á teldu.

Áhugað kunnu venda sær til teknistovuna.

**Sp/f Teknistovan**
v/ Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen,
ráðg. byggifrøðingar
Tel. +298 442105 · Fax +298 442107
Far.: J. K. J. 212105 · H. O. 228752
e-mail: klement@post.olivant.fo
FO-510 Gøta

# Móttøkufólk

Søkt verður eftir móttøkufólki seinnapart at byrja skjótast til ber. Arbeiðið fevnir um telefonavgreiðslu og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn
tlf. 31 11 45
og spyrja eftir Óla Jákup Kristoffersen
e-mail: ojk@advlaw
ella Elini Svínoy, e-mail: els@advlaw.fo




2. hvønn mikudag

<ph_1>

<ph_1>

# Bilur til sølu



Audi A4, árg. 96, koyrt 92.000 km, sýnaður í okt., bara tveir eigarar, ongin roykari. Originalar Audi felgur v/ dekkum + fýra spildurnýggj heilársdekk v/ sportsfelgum. Bíliga til sølu.

**Tlf. 226297**

# AUTO

-Dag & nátt-

Vilt tú bil hýra - ring 311234

-Alt døgnið-

Nú fáast eisini Talutíðarkkort

Føroya Tele Kall

BENZIN DIESEL KIOSK



AUTO 311234

veitst tú ikki tað?

www.sosialurin.fo



Barnagarðurin á Velbastað sóknast eftir

# Varaleiðara og sjúkravikari

***Varðaleiðari:***

- Hevur tú hug at nýta tínar praktisku royndir og í samstarvi við leiðara og starvsfólk at menna Barnagarðin til ein mynsturstovn?
- Hevur tú hug at vera "sparringspartnari" hjá leiðaranum. Arbeiðið er 40 tímar um vikuna

***Vit vænta:***

- At tú hevur visiónir og hevur hug at verða aktiv/ur í leiðsuni og menningini av barnagarðinum.
- At tú er positiv/ur og sær trupulleikar sum uppgavur heldur enn forðingar.
- At tú hevur góð samstarvsevni, er fleksibil og torir at tosa um forðingar.
- At tú sær møguleikar og avbjóðingar í náttúruni.
- At tú hevur royndir frá dagstovni.
- At tú kanst byrja 1. februar ella 1. mars 03.

***Sjúkravikarur:***
Vit sóknast eisini eftir einum avloysara at heita á undir sjúku og feriu. Viðkomandi kann rokna við inn ímillum at hava nógvar frídagar og at talan bert verður um fáar tímar summar dagar. Sjúkravikarurin skal vera tøkur skjótast tilber.

***Løn:***
Løn sambart sáttmála við Føroya Pedagog Felag.

***Umsókn:***
Umsøkn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 15. jan. 03. Nærri fæst at vita á Tel 32 81 21, spyr eftir Hannu Jacobsen ella Elsu Jacobsen.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Í barnagarðinum eru ein vøggustova og tvær barnagarðsstovur við elluvu børnum á hvørjari stovu. Barnatalið lækkaði 1.jan. 03. Børnini koma úr Kirkjubø, Velbastað og Havn.

Endamálsorðingin hjá stovninum er frá 1997 og soljóðandi: "Endamálið er at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar, bæði kropsliga og sálarliga og tryggja, at børnini fáa nógvar og ríkar upplivingar. Vit ynskja, at børnini ótarnað skulu sleppa at spæla; harumframt skulu tey sleppa at vera við til at taka avgerðir, og starvsfólkini skulu lurta eftir teimum og geva sær stundir til tey."

FØROYA LANDSSTÝRI

**Fiskimálaráðið**

# Skeiðlærari til Trygdarmiðstøðina fyri sjófólk

Vegna økt virksemi, søkir Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hervið eftir einum persóni, sum kann undirvísa í trygd á sjónum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**

- Undirvísa í trygd á sjónum, sum umfatar bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar- og eldsløkkiútgerð v.m.
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnuni
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði á venjingarstøðini.

**Førleikakrøv:**

- Tað verður sett sum krav, at umsøkjari skal hava útbúgving sum navigatørur við royndum frá sjóvinnuni ella frá frálandavinnuni.
- Fyrimunur er, um viðkomandi hevur royndir í at undirvísa og fyriskipa trygdarvenjing umborð á skipi.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna taka ymisk endurútbúgvingarskeið, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanartreytir:**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og stovnar/deildir undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovan. Tænastustaðurin er í løtuni Trygdarmiðstøðin í Klaksvík.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. februar 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
Att.: Sjóvinnufyrisitingin,
Postsmoga 347 · 110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Trygdarmiðstøðina á tlf. 455882, og tosa við Marius Magnusson, leiðara, ella til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Mary J. í Garði fíggjarfulltrúi.

# Skibsfører – STCW II/2

OD

Til snarlig tiltrædelse søges skibsfører til ansættelse i M/V Nordland Saga (DIS-flag). Skibsfører med erfaring fra reeferskibe, samt sejllads i Nordatlanten vil blive foretrukket.

Venligst fremsend skriftlig ansøgning per e-mail eller post, vedlagt kopier af relevante dokumenter til:

**Rederiet Otto Danielsen**
Kongevejen 272A
2830 Virum
Mrk: Skibsfører Nordland Saga
E-mail: tech@ottodanielsen.com

www.sosialurin.fo

FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag – fríggjadag $9^{00}$–$17^{00}$
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!

Sjónband - 31 77 74

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar
FO-188 Hoyvík
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Søkt verður eftir vikari í lærugreinunum **lívfrøði** (umleið 17 tímar/viku) og **ítrótti** (6 tímar/viku) frá 1. febr. 2003 til 30. juni 2003.

Størvini verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsøkjarar sum eru ávegis í lesnaðinum, men uttan endaligt prógv, kunnu eisini søkja.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. jan. 2003.

# Sandoyar Sjúkrakassi

Limagjaldið fyri 2003 er kr. 210,00 um mánaðin.